# Argjamenn nærkast oddinum

**TB vann oddadystin móti Royn leygardagin, og harðastu kappingarneytarnir hjá TB í løtuni eru argjamenn, sum vunnu í Sumba**

2. DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Klaksvíkingar vunnu spennandi dystin móti B71 í Klaksvík leygardagin 4-3*

Mest áhugaverdi dysturin í 2. deild hetta vikuskifti var uttan iva oddadysturin millum grannarnar úr TB og Royn, sum var leiktur á Sevmýri leygardagin.

### Hallur gjørdi bart

Tað vóru gestirnir úr Hvalba, sum byrjaðu dystin betur, og dysturin var ikki meiri enn 11 minuttir gamal, tá ið Rúni Thomsen legði Royn á odda 1-0. TB royndi at trýsta fyri at fáa útjavnandi málið, og tíggju minuttir eftir leiðslumálið hjá Royn, fekk heimaliðið brotsspark. Tað setti Einar Petersen í netið, og so var 1-1, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki var eingin ivi um, hvat var betra liðið, tí tvørámenn vóru greitt við yvirlutan, og serliga ein leikari skaraði framúr. Framherjin Hallur Christiansen var veruliga í essinum leygardagin, og hann gjørdi ikki mætari enn at skora øll fýra málini, sum TB fekk í seinna hálvleiki. Harvið vann TB dystin ruddiliga 5-1, og hevur tískil styrkt um oddasessin hjá sær.

### AB liggur framvið

Á Krossinum í Sumba var dystur millum sumbingar og AB. Hendan dystin vunnu argjamenn 3-1, men tað var ikki fyrr enn í evstu løtu, at sigurin bleiv staðfestur. Í fyrra hálvleiki vóru argjamenn klárt við yvirlutan, og tað kundi lættliga komið fleiri enn tey bæði málini, sum AB fekk fyri steðgin. Fyrst var tað Pætur Dam Jacobsen, ið legði gestirnar á odda 1-0, og eina løtu seinni økti Rúni Hvannastein, ið er komin úr B36, til 2-0, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki komu sumbingar fyri seg, og ungi Martin Poulsen minkaði um munin til 1-2, og heimaliðið trýsti ófort fyri at javna. Ístaðin var tað AB, sum í síðsta minutti sló kontra, eftir at Sumba hevði sent alt fólkið fram í brotsteigin hjá argjamonnum, og Símin Hansen skoraði fyri AB til endaliga úrslitið 3-1 til argjamenn.

### Spennandi dystur í Klaksvík

Ein tann mest spennandi dysturin var i Klaksvík, har KÍ hevði vitjan av B71. Klaksvíkingar fingu bestu byrjanina upp á dystin, og Alexander Djordjevic skoraði tvær, og so var heimaliðið á odda 2-0. Seinni noyddist Djordjevic av vøllinum við slitnari hælsinu, og hann verður neyvan at síggja aftur á vøllinum í ár. Jónsvein Thomsen minkaði um munin til 2-1, áðrenn unglingaleikarin Steffan Kalsø økti um KÍ-leiðsluna til 3-1. Sandingar góvu tó ikki skarvin yvir, og fyrst minkaði Clayton Soares til 3-2, áðrenn Jónsvein Thomsen aftur var upp á spæl og javnaði til 3-3. Tað vóru tó klaksvíkingar, sum høvdu síðsta orðið, og stutt fyri leiklok skoraði Gunnleif Biskopstø sigursmálið til 4-3 til KÍ.

### Tannleyst í Gundadali

Tað sást á øllum brøgdum, at tað vóru tvey av teimum veikaru liðunum í deildini, sum hittust í Gundadali leygardagin, tá ið B36 og VB dystaðust. Dysturin var ógvuliga vánaligur, og málmøguleikarnir fáir í tali. Sera lítið skipað spæl var í dystinum, og bæði liðini høvdu rættuliga nógvar ungar leikarar á liðnum. B36 fekk tó ein fyrimun um miðjan seinna hálvleik, tí tá bleiv málverjin hjá VB rikin av vølli. Havnarmenninir megnaðu tó ikki at gagnnýta yvirtalsstøðuna, hóast teir høvdu onkran opnan málmøguleika móti endanum av dystinum.

### Einvegis ferðsla í Vágum

FS Vágar ætlar sær ikki einki. Leygardagin vóru leirvíkingar á vitjan í Vágum, og teir blivu sendir norður aftur við einum lemjandi 2-7 ósigri. Liðskiparin hjá FS Vágum, Birgir Joensen, opnaði málveitsluna, tá ið hann legði FS Vágar á odda 1-0, men LÍF fekk tó javnaði við einum máli, sum Magni Høgnesen skeyt. Eftir hetta var tað tó fyri tað mesta talan um einvegis ferðslu, og Birgir Joensen var á blettinum einaferð afturat, Sonny Johansen skoraði tvær ferðir, og teir báðir Eyðfinn Fjalsbak og Jack Johansen fingu hvør sítt mál, áðrenn Andrias L. Olsen móti endanum av dystinum fekk pyntað um úrslitið fyri LÍF til endaliga úrslitið 7-2 til FS Vágar. Ein sigur, sum veruliga gevur vágamonnum blóð upp á tonna.

**TB-Royn 5-1**
0-1 Rúni Thomsen
1-1 Einar Petersen brts.
2-1 Hallur Christiansen
3-1 Hallur Christiansen
4-1 Hallur Christiansen
5-1 Hallur Christiansen

**B36-VB 0-0**

**KÍ-B71 4-3**
1-0 Alexander Djordjevic
2-0 Alexander Djordjevic
2-1 Jónsvein Thomsen
3-1 Steffan Kalsø
3-2 Clayton Soares
3-3 Jónsvein Thomsen
4-3 Gunnleif Biskopstø

**Sumba-AB 1-3**
0-1 Pætur Dam Jacobsen
0-2 Rúni Hvannastein
1-2 Martin Poulsen
1-3 Símin Hansen

**FS Vágar-LÍF 7-2**
1-0 Birgir Joensen
1-1 Magni Høgnesen
2-1 Sonny Johansen
3-1 Birgir Joensen
4-1 Sonny Johansen
5-1 Eyðfinn Fjalsbak
6-1 Wellington Soares
7-1 Jack Johansen
7-2 Andrias L. Olsen

## Stór frásøgn frá FM-róðrinum á Sundalagsstevnu verður í blaðnum í morgin






GÍ-HB 1-3(1-2)

# Kundi farið báðar vegir

**HB vann trupla útidystin í Gøtu sunnudagin, men høvdu gøtumenn verið eitt sindur neyvari, kundu teir eins væl havt stigini eftir í Gøtu**

GÍ-HB
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mangan hevur HB havt tað trupult, tá ið teir hava verið á vitjan hjá GÍ í Sarpigerði, og dysturin sunnudagin var einki undantak í so máta. Hóast havnarmenninir vóru favorittar undan dystinum, so var tað heimaliðið, ið byrjaði dystin best.

### Lítið skipað spæl

Nógvur vindur var í Gøtu sunnudagin, og hetta darvaði eisini spælinum nakað. Gøtumenn høvdu vindin undan í fyrra hálvleiki, og fleiri ferðir var ótrygga HB-verjan sett undir trýst. Serliga var tað úti í borðunum, at GÍ fekk sett trýst á gestirnar, men tað manglaði sum oftast tann seinasta avleveringin. Tað hevði kanska eisini hjálpt hjá gøtumonnum, um teir høvdu ein mann afturat heilt har frammi, tí ofta var Krystof Popczynski ógvuliga einsamallur í GÍ-álopinum.

Eisini á miðvøllinum, har HB vanligani er sterkast, var GÍ við yvirlutan, og landsliðsleikarin hjá GÍ, Súni Olsen, hevði ovmikið av plássi til at liggja og reika aftur og fram og lúra eftir møguleikanum fyri at sleppa framat við kanónini. Fyrstu løtuna var spælið ógvuliga óskipað, serliga hjá havnarmonnunum, men bráddliga var ein glotti, og tað gav eisini úrslit. Nærum ein hálvur tími var leiktur, tá ið Kári Nielsen hjá HB sendi Heðin á Lakjuni avstað í vinstra borði. Kviki klaksvíkingurin var knappur og sendi væl innfyri, og har var leikandi venjarin, Heine Fernandez, hægstur og stútaði bóltin í mál til 1-0 til gestirnar. Hetta var ikki heilt í tráð við dystargongdina, men málið hjá Fernandez fekk leikararnar hjá HB at vakna við, og næstu løtuna var betur skil á hjá føroyameistarunum.

Tó gav altíð vandamikli Súni Olsen áskoðarunum eitt gott dømi um, hví hann av mongum verður mettur sum okkara allarbesti langskotsskjútti. GÍ fekk eitt fríspark einar 25 metrar frá HB-málinum, og landsliðsleikarin langaði til. Bóltsurin brast í tvørstongina og niður á sjálva málstrikuna, áðrenn hann bleiv sparkaður burtur av HB-verjuni. Eitt framúr gott fríspark, sum hevði uppiborið eina betur lagnu.

Ístaðin fyri at GÍ fekk javnað til 1-1 við frísparkinum hjá Súna, vóru tað gestirnir úr Havn, sum bert tríggjar minuttir seinni øktu um leiðsluna. Heine Fernandez fekk loyvi til at renna ótarnaður heilt inn í brotsteigin hjá GÍ, áðrenn hann bleiv takladur. Bólturin stakk yvir til liðskiparan hjá HB, Rúna Nolsøe, sum hevði góða tíð at langa bóltin í mál til 2-0.

Gøtumenn fingu tó minkað um munin beint fyri hálvleik, men tað skuldi eitt ógvuliga bíligt brotsspark til tað. Rasmus Nolsøe hjá HB bleiv dømdur fyri at hava verið ov harðligur við ein GÍ-leikara, og tað mundu tað verða fá onnur enn dómarin, ið sóu. Eitt ógvuliga ivasamt brotsspark. Leikandi venjarin hjá GÍ, Krystof Popczynski, skoraði ósvikaliga trygt, og tað var júst tað, ið GÍ hevði brúk fyri, áðrenn farið var til hálvleiks.



*Rógvi Jacobsen var aftur hesaferð millum málskjúttarnar hjá HB, og klaksvíkingurin hevur nú skorað seks mál í átta umførum, tað sama sum leikandi venjarin Heine Fernandez*
*savnsmynd*

### Rógvi avgjørdi

Gøtumenn løgdu bragdliga fyri eftir steðgin, og fleiri ferðir vóru boð eftir nýggja málverjanum hjá HB, Danny Rasmussen, sum hevði skúgvað Pól Næss Joensen út á beinkin. Danny hevði eitt sindur av nervum í byrjanini av dystinum, men spældi seg upp, og serliga í seinna hálvleiki hevði hann fleiri góðar bjargingar, tá ið gøtumenn roydnu at trýsta.

Dysturin bleiv avgjørdur, tá ið seinni hálvleikur var nærum hálvrunnin. Eftir at GÍ hevði havt eitt ávíst trýst á HB-málið eina góða løtu, komu havnarmenninir spakuliga inn aftur í dystin, og tá ið 63 minuttir vóru leiktir, fekk HB hornaspark í høgra borði. Heðin á Lakjuni sendi innfyri við vinstra beini, og inni í málteiginum var Rógvi Jacobsen hægstur og stútaði bóltin fram við Halli í GÍ-málinum, og so var 3-1 til HB. Hetta málið tók gassið av ballónini hjá GÍ, og tað sum eftir var av dystinum, var tað HB, ið var við yvirlutan og hevði fleiri stórar møguleikar at økja um leiðsluna.

### Hepnið fylgir oddaliðum

Ofta verður tikið til, at hepnið fylgir teimum liðum, ið eru við har frammi í oddinum, og dysturin sunnudagin mundi verða ein staðfesting av hesari útsøgn. Liðini bæði vóru ógvuliga jøvn, men tá ið samanum kom, fór HB suður aftur til Havnar við øllum trimum stigunum. Gøtumenn høvdu havt møguleikan at ogna sær stigini, men ein tvørstong og væntandi neyvleiki í avgerandi løtum gjørdi, at tað ikki lukkaðist hjá teimum. Hinvegin vóru havnarmenninir meiri avgjørdir, tá ið høvi beyðst, og tí vóru tað teir, sum vóru omaná, tá ið dómarin, Eiler Rasmussen, bríkslaði fyri seinastu ferð.

Hjá GÍ var saknurin í Atla Gregersen í miðverjuni eisini stórur, tí at HB í Heina Fernandez og Rógva Jacobsen hevur tveir áleyparar, ið eru sera sterkir í luftini. Miðverjarnir báðir hjá GÍ, Pól og Kaj Ennigarð, høvdu annars gott tak á HB-framherjunum, men báðir mistu hvør sína ferð í luftini, og í báðum førum kostaði tað mál.

### FAKTA

**GÍ-HB 1-3(1-2)**
0-1 Heine Fernandez
0-2 Rúni Nolsøe
1-2 Krystof Popczynski brtsp.
1-3 Rógvi Jacobsen
**GÍ:** Hallur Hansen - Leivur Hansen, Pól Ennigarð, Kaj Ennigarð, Hanus Jacobsen, Símun Louis Jacobsen - Áslakkur Petersen, Hans Pauli Petersen, Pól Henning Jacobsen - Súni Olsen - Krystof Popczynski
**Gult kort:** Leivur Hansen og Pól Ennigarð
**HB:** Danny Rasmussen - Hallur Danielsen (66. Eli Thorsteinsson), Símun Eliasen, Vagnur Mohr Mortensen, Rasmus Nolsøe - Jákup á Borg, Rúni Nolsøe (80. Emil Nolsøe Leifsson), Kári Nielsen, Heðin á Lakjuni - Rógvi Jacobsen, Heine Fernandez
**Gult kort:** Rógvi Jacobsen og Heine Fernandez
**Dómari:** Eiler Rasmussen: Hevði onkrar ivasamar avgerðir, og eisini kundi samarbeiðið við linjuverjarnar verið betur, men annars var ikki so nógv at seta fingurin á.

# Skaðin ikki so álvarsligur

Tað sá álvarsligt út, tá ið HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, bleiv borin av vølli eitt korter fyri leiklok eftir eitt hendiligt óhapp, men skaðin er neyvan so álvarsligur.

Teir nógvu HB-áskoðararnir, ið høvdiu leitað sær norður til Gøtu sunnudagin, fingu rukkur í pannuna, tá ið liðskiparin hjá føroyameistarunum, Rúni Nolsøe, bleiv borin av vøllinum seint í dystinum. Rúni og ein gøtumaður duttu um hvønn annan, og í fallinum beklaði Rúni á báðum beinum og noyddist tí at berast av vøllinum.

Seint sunnukvøldið tosaðu vit við Rúna, og tá segði hann, at skaðin neyvan var álvarsligur, tí longu tá fekk hann gingið aftur og sett fótin til. HB-liðskiparin roknar heilt vist við at verða klárur aftur til næsta dystin hjá havnarliðnum, sum verður í Gundadali um tíggju dagar, tá ið NSÍ kemur á vitjan í seinasta dystinum í fyrru helvt. Dysturin verður leiktur mikukvøld, tí at NSÍ leikar InterToto-Cup í vikuskiftinum.

Um sjálvan dystin í Gøtu sunnudagin, sigur Rúni, at hatta var eitt tað vánaligasta, ið HB hevur leikt í ár, men tá ið man fær øll trý stigini, ger tað onki, heldur hann. – Spælið hjá okkum hekk als ikki saman, og verjan var rættuliga ótrygg í fleiri førum, heldur Rúni Nolsøe.

*HB-liðskiparin Rúni Nolsøe bleiv borin av vølli seint í dystinum, men skaðin tykist ikki verða so álvarsligur*
*savnsmynd*

